**18.juni 2013**

**Til landsstýrismannin í skúlamálum, Bjørn Kalsø**

Vit heita við hesum skrivi á landsstýrismannin um at geva trivnaðinum í fólkaskúlanum hægri raðfesting.

Nógv børn trívast ikki í fólkaskúlanum. Trupulleikin við happing, sum var staðfestur í kanning frá 2007, er enn ein tyngjandi byrða fyri nógvar næmingar í fólkaskúlanum. Samskiftið og neyðarrópini, sum stóðust av átakinum "Hví happa" verkætlanini, sum næmingar úr 8.a í Eysturskúlanum gjørdu, vístu enn einaferð, at trupulleikin er til staðar og eigur at verða steðgaður.

Tað er neyðugt at raðfesta trivnaðin í fólkaskúlanum hægri. Hóast nógv verður gjørt innan skúlagátt, mugu vit staðfesta, at enn er langt eftir á mál, og at ein hægri raðfesting skal til, fyri at vit kunnu veita øllum næmingum fólkaskúlans eina trygga og nøktandi skúlagongd. Vit heita á landsstýrismannin um at styrkja og samansjóða trivnaðarátøkini í fólkaskúlanum soleiðis, at næmingar, sum siga frá, fáa neyðuga hjálp í truplu støðuni, tey eru í.

Vit mæla til, at landsstýrismaðurin setur eina trivnaðarkanning í verk skúlaárið 2013/14 og fær fólkaskúlaráðið at koma við einum tilmæli hesum viðvíkjandi.

Vit mæla til, at landsstýrismaðurin heitir á skúlastýri, lærarar, leiðslur, foreldur og næmingar um at arbeiða við trivnaðinum í fólkaskúlanum.

Vit mæla til, at floksins tími aftur kemur á tímatalvuna í fólkaskúlanum.

Vit mæla til, at landsstýrismaðurin tryggjar, at ein greið trivnaðarætlan finst á øllum skúlum, og at trivnaðarætlanin verður brúkt, tá ið trivnaðurin er vánaligur og skal styrkjast. Eisini má trivnaðarætlan skúlans javnan verða brúkt til fyribyrgjandi átøk. Skúlar skulu hava umstøður at fremja eina góða trivnaðarætlan í verki.

Vit vóna og vænta, at landsstýrismaðurin miðvíst fer í holt við at geva trivnaðinum í fólkaskúlanum enn hægri raðfesting.

Felagið Heim og skúli

Føroya Lærarafelag

Føroya Pedagogfelag

Barnabati

AKT-felagið

Serlærarafelagið

Ættleiðingarfelagið

Fosturforeldrafelagið